# Ársfrásøgn 2016

Vit byrjaðu 2016 við at hátíðarhalda 40 ára stovningardag Ráðsins fyri Ferðslutrygd í Öström fyri limum og øðrum innbodnum. Panelfundurin vitnaði um, at áhugin fyri at virka fyri, at færri doyggja ella fáa álvarsligan skaða í ferðsluni, enn finst millum politikarar og onnur áhugað. Koyriteknisk breyt, dagførd ferðslutrygdarætlan, skaðanevnd og betrað hagtøl vórðu tikin fram sum týðandi lutir í tilgongdini.

## Deyð í 2016

Í 2016 doyðu trý á føroysku vegunum, tvær kvinnur og ein maður. Vanlukkurnar vóru allar í bygdum øki. Samanbera vit við norðurlendsku grannar okkara, eru trý deyð eitt høgt tal. Her er yvirlit pr. 100.000 íbúgvar:




Kelda: Landsverk

Talvan vísir, at í Føroyum doyðu flest í ferðsluni í mun til fólkatalið, bæði fyri 2016 og tá vit rokna 10 ára miðal. Í Noregi doyðu í 2016 2,54 og Danmark 3,77 pr. 100.000 íbúgvar. 10 ára miðal fyri Føroyar í 2016 er 6,96.

Tíverri er ikki eydnast at fáa til vega svensku og finsku tølini fyri 2016.

## Ferðsluvanlukkur við fólkaskaða

Okkum manglar tíverri framvegis eftirfarandi hagtøl yvir ferðsluvanlukkur við fólkaskaða. Tølini, ið eru at fáa, vísa ikki eina neyva mynd av, hvussu mong fáa álvarsligan skaða í ferðsluni. Tey vísa hinvegin tøl á vanlukkum, har løgreglufólkið á staðnum metti, at onkur skuldi á sjúkrahús. Her verður ikki skilt ímillum smávegis løstir og tey, sum verða 100% óarbeiðsfør. Vit hava sostatt ikki skipað hagtøl yvir gongdina í tali av álvarsliga skaddum.

## Færri ung doyggja í ferðsluni

Verður hugt at, hvussu aldursbólkar doyggja í føroysku ferðsluni, er myndin broytt. Børn og ung doyggja ikki í sama mun, sum fyri 20-30 árum síðani. Í staðin er parturin av gomlum og eldri vaksin í mun til fyri 10 árum síðani.

Í tíðarskeiðnum 1986-1995 doyðu 33 fólk millum 15 og 24 ár. Tíggjuáraskeiðið eftir vóru tey 21 og í 2006-2015 vóru tað 6. Hetta er eitt ógvusligt fall. Tað er greitt, at ung ikki eru so yvirumboðað, sum tey hava verið í mong ár.










Í Danmark er talið á ungum ferðsluoffrum eisini fallið. Har er talið á deyðum 18-24 ára gomlum minkað niður í helvt frá 2010 til 2015. Sama rák er í Íslandi, tó at minkingin ikki er so stór sum í Føroyum.

RFF fegnast um at talið á ungum ferðsluofftum er fallið stútt og støðugt, tó at talið sjálvandi skal longur niður. Vit meta, at orsakirnar til fallið er ein røð av tiltøkum, har mann miðvíst hevur lagt seg eftir at ávirka váðan hjá teimum ungu. Tey hava fingið størri virðing fyri atferð í ferðsluni. Fleiri brúka trygdarbelti og alsamt fleiri ung taka frástøðu frá rúsdrekkakoyring. Rúsdrekka er tó framvegis ein týðandi lutur í vanlukkum við álvarsligum útgangi.

Ferðslutrygd metir, at ferðsludagarnir, sum allir 8. flokkar hava verið bodnir til í nú 19 ár, eiga sín lut í minkaða talinum av ungum ferðsluoffrum. Føroyar er einasta Norðurland, sum ár um ár røkkur einum heilum árgangi við ferðsludøgum. Týðandi orsakir eru eisini, at bæði vegir og bilar eru vorðnir tryggari seinnu árini.

### Gomul doyggja í størri mun

Vit gerast tíbetur alt eldri í Føroyum, sum merkir at talið á gomlum veksur. Fleiri kanningar vísa, at eldri bilførarar ikki eru vandameiri í ferðsluni enn aðrir aldursbólkar, men at teir eru meiri útsettir fyri nøkrum vanlukkusløgum. Eldri fáa ofta álvarsligari skaða ella doyggja í sambandi við ferðsluvanlukkur.

Við tað at álvarsligar ferðsluvanlukkur ikki verða greinaðar til botns í Føroyum, eins og hagtøl yvir vanlukkuorsakir eru ikki eru tøk, ber tíverri ikki til at meta um orsakirnar til, at lutfalsliga fleiri eldru eru deyð.

RFF hevur í hyggju at bjóða sær at vitja eldrafeløg fyri at koma í samband við eldri, í fyrra lagi at frætta, hvussu tey halda, at Ráðið kann gera mun fyri tey og í øðrum lagi at hava upplýsandi framløgur.

## Landsfevnandi átøk í 2016

Ráðið hevur í 2016 framt átøk viðvíkjandi ferð, rúsdrekkakoyring, ferðsludøgum fyri 8. flokkum, súkkluhjalmum, endurskinsvestum, taskuendurskinum og einglum við endurskinum.

Endiliga høvdu vit í fjør royndarverkætlan um samstarv við fyritøkur um trygga ferðslu. Eisini høvdu vit á fyrsta sinni kommunur við í samstarvi um vegplakatir í sambandi við átak.

## Ferð – vrak fram við landsvegi

Aftur í 2016 vórðu føroyskir bilførarar mintir á at halda hámarksferðina. Bygt varð víðari á filmin, 'Hin dagin eg hevði skund' frá 2015, sum aftur var í sjónvarpi, á netinum og í útvarpinum. Í átakinum vórðu bilførarar ávirkaðir í koyristøðuni. Á fimm útvaldum støðum á landsvegum kring landið vórðu settar upp bingjur við bilvrakum frá veruligum ferðsluóhappum. Á síðuni á bingjuni stóð boðskapurin: 'Hin dagin eg hevði skund' við mynd úr filminum. Fyri at vissa, at støðini við bingjum ikki nervaðu ferðslutrygdina, vórðu tey fimm støðini útvald í samstarvi við Landsverk, sum eisini gav loyvi til uppsetinginar. Átakið varð gjørt í samstarvi við Tryggingarfelagið Føroyar.




Gallupkanning eftir átakið vísti, at síðan 2012 høvdu ongantíð so mong sagt seg halda hámarksferðina: 46%. Greitt var - eins og væntað - at átakið mest hevði ávirkað tey, sum áður høvdu sagt seg koyra 90 km/t. Meðan talið á teimum, sum søgdu seg koyra 100 km/t og skjótari, var 11% av teimum spurdu. Áðrenn átakið søgdu bert 39% seg halda hámarksferðina. Beint eftir átakið í august søgdu 46% seg gera tað. Hetta er eitt fitt lop í eitt gott ár, sum Ferðslutrygd fegnast um. Aldursbýtið í kanningini vísti, at tey 18-24 ára gomlu í minstan mun halda hámarksferðina: bert 24%.




## Samstarv við kommunur

Á fyrsta sinni bjóðaði RFF kommunum at vera við í landsfevnandi átaki. Fimm kommunur tóku av at hava skelti á kommunuvegum við sama boðskapi sum á bingjunum: Runavíkar kommuna, Nes kommuna, Fuglafjarðar kommuna, Eysturkommuna og Vága kommuna. Ov nógv ferð er ein trupulleiki bæði í bygdum og óbygdum økjum, og endamálið var at geva átakinum størri slagmátt.




Eftirmetingarnar hjá kommununum vóru ógvuliga jaligar. Kommunurnar vóru samdar um, at tað var viðkomandi at samstarva um ferð, og tær flestu kundu eisini hugsað sær tilsvarandi átøk um *rúsdrekka, skúlabyrjan og gáloysni*. Eisini varð víst til samstarv um ungdóm á prutli, súkklur og eldri. Men her varð eisini hugsað um annað samstarv enn vegplakatir.

## Steðga rúsdrekkakoyring

"Ein skeiv avgerð kann broyta nógv … kanska alt," var boðskapurin í nýggjum stuttfilmi, har Trygd, Rúsan og RFF vildu steðga rúsdrekkakoyring. Í filminum sóu vit ungan mann sum er frá sær sjálvum í sorg og vónloysi. Í eini støðu, sum allarflest okkum kenna: Í hugnaligum og stuttligum jólaborðhaldi saman við vinum. Vit síggja eisini, at hann tekur eina skeiva avgerð.




Átakið var sjónligt á portalum, á internetinum, biografum og í sjónvarpinum, miðnámsskúlum, umframt at fólk sóu plakatir og myndir á jólaborðhaldum og á skeinkistøðum. Eisini sølustøð fyri rúsdrekka tóku undir at fáa boðskapin út og steðga rúsdrekkakoyring. Á øllum deildum hjá Rúsdrekkasøluni og Føroya Bjór var boðskapurin frá filminum ógvuliga sjónligur. Hetta við merkjum á vørum og inni í hølunum.

Filmurin er higartil vístur á youtube fleiri enn 25.000 ferðir.

## Samstarv við fyritøkur

Ráðið hevur í eina tíð havt í hyggju at bjóða fyritøkum samstarv. Okkara motivatión er, at gransking vísur, at í 35% av deyðsvanlukkum í ferðsluni er vinnuakfar partur av vanlukkuni. Endamálið við samstarvi við fyritøkur er at betra atferð í ferðsluni hjá vinnuakførum.




Innihaldið í samstarvi við fyritøkur verður:

1. Váðaprofilur. Við amboði hjá systurráðnum í Danmark, Sikker Trafik, verður gjørdur váðaprofilur út frá svarum hjá starvsfólki um teirra hugburð/atferð í ferðsluni
2. Endurskoðan ella áseting av koyripolitikki
3. Innanhýsis átøk – átøk hjá RFF verða sjónlig á fyritøkum

Í farna ári hevði RFF royndarverkætlan saman við SEV, har vit royndu omanfyristandandi. Váðaprofilurin riggaði væl, og RFF fer í 2017 at bjóða fyritøkum samstarv um ferðslutrygd.

## Halt 1,5 metur frástøðu

Í vár mintu vit á, at alt fleiri súkklur eru at síggja í ferðsluni. Bæði í bygdum og óbygdum øki. Við seks smáfilmum minti Ráðið partarnar á at vísa hvør øðrum atlit og tolsemi. Hetta við

boðskapinum, *Halt 1,5 metur frástøðu*. Her vórðu bilførarar mintir á at halda 1,5 metur frástøðu til súkklur, tá teir fara framvið.







## Afturvendandi átøkini

### Ferðsludagar fyri 8. floksnæmingum og næmingum í Tekniskum skúlum

Ferðsludagarnir vórðu hildnir fyri 8. flokkum og 1. ársnæmingum í Teknisku skúlum eins og undanfarin ár. Tiltakið er samskipað av Ferðslutrygd og stuðlað av Trygd og Tryggingarfelagnum Føroyum.





### 1-1-2 dagar

RFF tók lut á árliga 1-1-2-degnum, har løgreglan, brandstøðin, sjúkraflutningstænastan og Ferðslutrygd møta elstu barnagarðsbørnunum. Dagurin varð hildin í Tórshavnar kommunu og í høllini á Skála.







### Súkkluhjálmar til 1. floksnæmingar

Sum helst tey einastu í heiminum fáa øll børn í Føroyum, sum fara í 1. flokk, hvør sín hjálm til gávus í samstarvi millum Trygd og Tryggingarfelagið Føroyar. Her eru tað næmingar í Kaldbaks skúla.



### Endurskinsvestar

Í samstarvi við Tryggingarfelagið Føroyar hevur Ráðið í mong ár latið øllum 1. floksnæmingum endurskinsvestar. Í 2016 fingu næmingarnir harumframt taskuendurskin, so tey síggjast betur aftanífrá. Her næmingar í Vestmanna skúla.



## Framlítandi fokus

Yvirskipaða framlítandi stavnhald hjá Ferðslutrygd verður móti økjunum børn, ung og samstarv við fyritøkur. Harumframt verður virkað dyggiliga á øðrum økjum so sum: ferð, rúsdrekka og undirvísing í fólkaskúlanum. Eisini arbeiða vit fyri at kunna møta eldrafeløgum kring landið um avbjóðingarnar hjá eldri í ferðsluni. Átøkini skulu vera støðug og áhaldandi fyri at tryggja bestu fortreytir fyri betraðum vanum í ferðsluni.

Í løtuni hevur Ráðið eisini í hyggju at samstarva um munadygt átak móti gáloysni í ferðsluni, herundir nýtslu av fartelefonum. Vit arbeiða við at finna stuðlar til hetta, sum vónandi tryggjar neyðugu fíggingina til at fullgera eitt áhaldandi átak.

Við góðu royndunum við samstarvi við kommunum um vegplakatir frá sumrinum 2016 er ætlanin at gera tað til fastan tátt at bjóða kommunum at vera við í landsfevnandi átøkum ljósu tíðina. Málið er at fáa allar kommunur við.

### Hvussu koma vit best víðari

Ráðið fyri Ferðslutrygd metir, at hesi stig eru tey mest átroðkandi at virka fyri fyri at røkka nullhugsjónini um at eingin skal doyggja ella fáa álvarsligt mein í vegaflutningsskipanini.

Tey trý ovastsu stigini eru **sjálvsagdar fortreytir** hjá øllum grannalondum okkara fyri arbeiðnum at skapa tryggar vanar í ferðsluni:

*1. Ferðslutrygdarætlanin dagførd*
Tað er umráðandi, at ferðslutrygdarætlanin, sum gekk út í 2015, verður dagførd. Tað eigur at vera øllum greitt, hvørji yvirskipað tiltøk, ið partarnir, ið varða av ferðslutrygdini, meta hava størst týdning. Tað er ikki nóg mikið, bara at siga, at eingin skal doyggja í ferðsluni – vit mugu eisini kunna svara upp á, *hvussu* vit vilja røkka málinum. Viðkomandi partar at dagføra ferðslutrygdarætlanina eru: Landsverk, kommunuumboð, løgreglan, Akstovan og Ferðslutrygd. Landsstýrið er umboðað í stýrisbólki. Nýggj vitan og nýggjar royndir hjá grannalondum eiga at verða greinaðar í mun til Føroyar.

*2. Hagtøl skipað og nágreinað*
Hagtøl mugu verða skipað og raðfest av viðkomandi pørtum: Løgreglu, sjúkrahúsum og Landsverki. Hesir partar eiga í nógv størri mun at framleiða, greina og samstarva um hagtøl.

*3. Skaðanevnd til álvarsligar vanlukkur*
Vit vita alt ov lítið um, hvørjar orsakir eru til ferðsluvanlukkur í Føroyum, og í hvønn mun tær koma fyri. Alt ov nógv vitan fer fyri skeyti, sum kundi givið okkum innlit í okkara støðu, og soleiðis møguleika at fyribyrgja vanlukkum.

*4. Fleiri kunningarátøk*
Kanningar vísa, at í umleið 90% av deyðsvanlukkum í ferðsluni eru menniskanslig mistøk partur av orsøkini. Samstundis vísa hugburðarkanningar okkara, at mong hava fyri neyðini at verða mint á trygga atferð í ferðsluni.

*5. Endurskoðan av bótum*
Bøtur eiga javnan at verða endurskoðaðar. Vit meta, at millum annað nýtsla av fartelefon, sum í dag gevur bót á 500 kr eigur at verða endurskoðað. Eisini bøtur fyri ov nógva ferð eiga at verða dagførdar. Í løtuni er uppskot um broyting í ferðslulógini til viðgerðar í løgtinginum, har millum annað skotið verður upp at dagføra nevndu bøtur. Ráðið vónar, at uppskotið verður samtykt.

*6. Meiri løgreglueftirlit*
Tað er væl og virðiliga skjalprógvað, at kanst tú vænta at møta løgregluni í ferðsluni, hevur tað ávirkan á, hvussu tú ber teg at í ferðsluni.

## Sum land mugu vit góðtaka at gera íløgur í betri vanar í ferðsluni
Ein trygg vegaskipan krevur, at tey, sum brúka hana, fylgja ferðslureglunum. Hugsjónin – nullhugsjónin – viðurkennir menniskjansligar feilir ella manglandi evnini hjá fólki í ferðsluni, men hon góðtekur ikki manglandi vilja.

Hesin viljin má ávirkast gjøgnum ferðslutrygdararbeiðið. Hetta eru tiltøk, sum skulu eggja okkum til at velja tær tryggu loysnirnar og ta snildu atferðina, so vit koma óskalað heim, sama um vit ganga, súkkla, koyra bil, motorsúkklu, prutl ella taka bussin.

At ávirka atferðina hjá fólki í ferðsluni krevur tilfeingi. Tiltøkini mugu byggja á fakligan kunnleika um, hvussu vit broyta vanar. Hetta krevur eitt skipað arbeiði við at ávirka atferðina hjá fólki. Hetta arbeiðið er so týdningarmikið, at vit sum land mugu finna okkum í at brúka tilfeingi upp á tað.

Her bíða stórar uppgávur, millum annað:

- Í Føroyum doyggja munadi fleiri í ferðsluni enn í Noregi, Svøríki og Danmark í mun til fólkatalið
- 60% av bilførarum siga seg vanliga bróta hámarksferðina á landsvegi
- 37% siga seg javnan tosa í handhildna fartelefon

Ikki bara fyri offrini fyri ferðsluni og teirra kæru loysir seg at fyribyrgja vanlukkum. Tað loysir seg eisini fyri samfelagskostnaðin. Við størri íløgu í at betra ferðsluvanarnar hjá føroyingum, kundu vit spart stórar útreiðslur – bæði peningaliga og menniskjansliga. Við nullhugsjónini sum stavnhaldi og sum § 1 í ferðslulógini noyðast vit at gera meiri at minka um vanlukkurnar. Tað sømir seg ikki ár eftir ár at góðtaka, at her doyggja nógv fleiri enn í grannalondum okkara, at vit rætt og slætt ikki vita hví, og onga yvirskipaða ætlan at hava fyri, hvussu vit venda hesi álvarsligu stillstøðu.

*14. februar 2017*
*Raðið fyri Ferðslutrygd*